Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru (Foreldramyndugleikalógin)
(Samverusjikana, ferðing í sambandi við samveru og aðrar broytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 16. mai 2022 um foreldramyndugleika og samveru (Foreldramyndugleikalógin) verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 20, stk. 3 og 4 verða strikað, og í staðin verður sett:
"*Stk. 3.* Familjufyrisitingin kann eftir umbøn taka avgerð um vavið og útinnan av samveru og kann áseta neyðugar treytir í tí sambandi, undir hesum um at varðveita passið hjá barninum og at tryggja, at samveruforeldrið ikki er ávirkað av alkoholi ella øðrum dusandi evnum, meðan samvera er.
Stk. 4. Bæði samveruforeldrið og bústaðarforeldrið kunnu søkja um at fáa samveru ásetta. Familjufyrisitingin kann tó bara áseta samveru, um samveruforeldrið vil hava samveru.
Stk. 5. Familjufyrisitingin kann nokta at áseta samveru ella seta eina avtalu ella avgerð um samveru úr gildi."

2. § 21 verður orðað soleiðis:

"**§ 21.** Ásett ella avtalað samvera dettur bara burtur, tá ið foreldrini hava avtalað tað, ella tá ið Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um tað sbrt. §§ 20 og 22 ella tá ið rætturin hevur tikið avgerð um tað sbrt. § 593 í Retsplejelov for Færøerne."

3. § 23 verður orðað soleiðis:

"**§ 23.** Er barnið ættleitt, kann Familjufyrisitingin eftir umbøn áseta samveru ella annað samband við uppruna skyldfólk, serliga um barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við viðkomandi, ið søkir um at fáa samveru ásetta."

4. Yvirskriftin yvir § 29 verður orðað soleiðis:

"*Ferðing í sambandi við samveru*"

5. § 29 verður orðað soleiðis:

"**§ 29.** Foreldrini hava felags ábyrgd av at leggja ferðing í sambandi við samveru til rættis.
Stk. 2. Familjufyrisitingin kann í heilt serligum førum og eftir umbøn taka avgerð um, hvussu ábyrgdin av ferðingini í sambandi við samveru skal býtast millum foreldrini.
Stk. 3. Verður samvera ásett við onnur enn foreldur, hevur viðkomandi ábyrgd av ferðingini í hesum sambandi."

6. § 32, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, og mál um foreldramyndugleika er lagt fyri rættin, kann Familjufyrisitingin taka avgerð um, hjá hvørjum av foreldrunum barnið fyribils skal búgva."

7. Sum yvirskrift yvir § 39 verður sett:

"*Sjónarmiðini hjá barninum*"

8. Sum yvirskrift yvir § 42 verður sett:

"*Váttan*"

9. Sum yvirskrift yvir § 43 verður sett:

"*Fíggjarligar upplýsingar*"

10. Sum yvirskrift yvir § 44 verður sett:

"*Broyting og avvísan av umbøn um broyting*"

11. § 45, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Foreldur, ið eru partur í einum máli um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 og um samveru sbrt. §§ 20 og 21, hava rætt til ókeypis advokatumboðan."

12. Í § 47, nr. 5 verður "ferðaútreiðslur" broytt til: "ferðing".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024

Samtykt á Løgtingi hin 11.12 2023 við 28-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 12. desember 2023

stjóri

LM-033/2023